Fylgiskjal 7

LM-107/2020

Tryggingareftirlitið

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn 22. desember 2020
Journalnr.: 20/00555-2

Hoyringssvar til uppskot til broyting í grannskoðaralóggávuni

Tryggingareftirlitið móttók 26. november 2020 *Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir* við fylgilóggávu til hoyringar.

Tryggingareftirlitið hevur hesar viðmerkingar:

1. **Allýsing av tryggingarfeløgum**

Feløg undir eftirliti hjá Tryggingareftirlitinum eru í lógaruppskotinum allýst sum fyritøkur av almennum áhuga sambært broyting nr. 5 (nýggj § 1a, stk. 1, nr. 3, litra b) við hesi orðing: *"...tryggingarfeløg, sbr. § 1 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, tó undantikið tryggingarmeklaravirksemi"*.

Mælt verður til at broyta hesa ávísing til § 5, stk. 1, nr. 11 í tryggingarlógina í staðin, so orðingin í lógaruppskotinum heldur verður *"...tryggingarfeløg, sbr. § 5, stk. 1, nr. 11 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019"*.

2. **Feløg av almennum áhuga**

Í broyting nr. 5 (nýggj § 1a, stk. 1, nr. 3, litra b) verður ásett, at ávísar fyritøkur, sum eru fevndar av *anordning for Færøerne af lov om finansiel virksomhed* ella av tryggingarlógini, verða allýstar sum fyritøkur av almennum áhuga.

P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag er ikki fevnt av tryggingarlógini, men er skipað við heimild í serlóg, nevniliga *Løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag*. Tað kann vera víst á, at P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag í lógaruppskotinum tí ikki verður fevnt av allýsingini í § 1a, stk. 1, nr. 3, litra b.

3. **Kunngerð um grannskoðanarbólk í virkjum og samtøkum, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum**

Frammanundan vóru reglur um grannskoðanarbólk fyri fíggjarfyritøkur í *Kunngerð nr. 97 frá 3. oktober 2012 um grannskoðanarbólk í virkjum og samtøkum, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum*, sum varð givin við heimild í § 29, stk. 8 í galdandi løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir.

Sambært uppskotinum til løgtingslóg verður § 29 umorðað, og ásetingar um grannskoðanarbólk settar í sjálva lógina. Kunngerðin fer tí framyvir ikki at geva meining, og skal avtakast, tá lógarbroytingin kemur í gildi.

Tað kundi verið stutt umrøtt, t.d. í almennu viðmerkingunum, at fyri fíggjarfyritøkur koma ásetingarnar um grannskoðanarbólk ístaðin fyri galdandi reglur í *Kunngerð um grannskoðanarbólk í virkjum og samtøkum, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum*.

Tryggingareftirlitið hevur annars ikki viðmerkingar til uppskotið.

Vinarliga

Terji Petersen